## G! váttar Kaizers Orchestra

FESTIVAL-SUMMARIÐ

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Sum Planet.fo avdúkaði longu sunnudagin, so spælir Kaizers Orchestra á G! Festivalinum. Hetta váttar festivalurin í dag í tíðindaskrivi

G! Festivalurin skrivar m.a.: Okkum nýtist hvørki at pella, gera ov nógv av ella finna uppá nakað nýtt. Vit kunna bara róliga og sannførandi endurgeva tað sum fleiri og fleiri eru samd um: Kaizers Orchestra eru millum heimsins bestu livebólkar. Og tað er ikki vit sum hava funnið uppá at kalla teir tað. Omanfyri síggjast nøkur fá brot av umrøðu, sum onnur siga um bólkin.

Tónleikurin hjá Kaizers Orchestra er eitt ósannlíkt, men fantastiskt bland av AC/DC og metal-rokki við sigoynaratónleiki av balkan, Tom Waits, kvøðuljómatónum og eini rúgvu av øðrum. Skapt við serligum Kaizer uppfinngar- og skemtingarsemi. Kaizers Orchestra hava harafturat eitt einastandandi tev fyri góðum melodistrofum og framúr evni at fáa tingini at svinga.

Sum tú kanska skilir á lagnum, so er ilt at seta orð á fyribrigdið Kaizers Orchestra, sum helst er mest kultaði norðurlendski bólkurin yvirhøvur. Teir eru gallsvakir og bróta gleðiliga allar reglur og konventiónir innan tónleik, men halda tó altíð í trúskapi móti tí viktigastu lógini av øllum: Tað skal verða feitt at lurta eftir.

Og live er tað, at tað veruliga blívur gandur. Tí Kaizers eru ein veitslumaskina av eini aðrari verð - Við gassmaskum, oljutunnum, kúbeinum, bilfelgum og pumpuorgli, eru framførslurnar ein totaluppliving, eitt absurd teatur og freak show við garanti at fáa teg at vagga, ompa og bresta út í harðan látur upp til fleiri ferð.

Tað eru ikki vit, sum hava funnið uppá at kalla Kaizers Orchestra fyri heimsins besta livebólk. Men vit hava funnið uppá at hála teir til Føroya á G! Festival, so føroya fólk fær høvið til at meta um frá fyrstu parkett, hvat hetta er fyri nakað og hvat hetta alt snýr seg um, hóskvøldið á G! Festival. Tú mást fara!

# Ársins fyrstu pisur klaktar

**Tá ið pisurnar verða klaktar, er summarið komið. Í gjár fingu fyrstu studentarnir húgvuna á høvdið, men hesa næstu vikuna verður hetta vanlig sjón um alt landið**

PISUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*




*Heidi Bech, hørgrumegin, var fyrsta pisan í ár og henni á baki kom Dania Sørensen. Hvørgin teirra hava gjørt av, hvbat prógvið skal brúkast til*

Eru smálombini eitt ósvitaligt tekin um, at várið er komið, eru studentar undir hvítari húgvu eitt líka víst tekin um, at nú er summarið komið.

Og í gjáramorgunin vórðu tær fyrstu pisurnar í ár klaktar og tað var á miðnámsskúlanum í Suðuroy.

Tær fyrstu at fáa húgvuna á høvdið, vórutveir porkenningar, Heidi Bech, sum var ársins fyrsta pisa og Dania Sørensen, sum báðar her eru avmyndaðar á trappuni til miðnámsskúlan í Vági.

Tær eru báðar málsligir studentar og eru tær fyrstu av gott 20 pisum, ið verða klaktar í Suðuroy í ár.

Hvørgin teirra hevur gjørt av, hvat prógvið skal brúkast til og sostatt hava tær heldur ikki søkt á skúla eftir summarfrítíðina. Tær ætla sær av hava eitt sabbat ár frá skúlanum og royna at fáa arbeiði fyri at vinna eitt sindur av peng-um, samstundis sum framtíðarætlanir skulu leggjast.

Seinni í vikuni og fyrst í næstu viku verða allir hinir studentarnir lidnir í Suðuroy og hesar næstu dagarnir koma so studentarnir og HF næmingarnir raplandi úr teimum fýra studenta- og HF skúlunum kring landið.

Tann 22. juni fáa studentarnir úr Suðuroy prógvini handað og dagin, eftir, 23, juni, verður pisufundur í Vági.

Gestarøðari verður Sjúrður Skaale og fyri næmingarnar fer Jens Hákun Leo úr Hvalba at røða.




**London**

Njótið eitt vikuskifti ella eina heila viku í hesum sera áhugaverda býi, sum hevur "alt" at bjóða.



**Sidney Hotel*****
við Victoria

3 nætur fyri hvønn í dupultkamari.
Eykanátt kr. 399,-
Eyka fyri einakamar pr. nátt kr. 200,-

**3.808,-**



**Hotel Americana*****
Baker Street

3 nætur fyri hvønn í dupultkamari.
Eykanátt kr. 351,-
Eyka fyri einakamar pr. nátt kr. 316,-

**3.663,-**



**Hyde Hotel*****
Paddington

3 nætur fyri hvønn í fýramans kamari.
Eykanátt kr. 321,-

**3.572,-**

Íroknað prísin er flogferð, gisting, morgunmatur og øll avgjøld.
Fá nærri at vita á 34 10 10 – ella á www.atlantic.fo

ATLANTIC AIRWAYS

Atlantic Airways ger tað stuttligari at liva í Føroyum | www.atlantic.fo

www.sansir.fo

**Innbjóðing til móttøku**

Vit hava latið upp nýggjan handil, og í hesum sambandi bjóða vit tykkum til móttøku í nýggju hølum okkara í SMS

**Hósdagin 15.juni kl. 18.00**

Fyri at hátíðarhalda dagin fer
Jóanes Nielsen at lesa egnar yrkingar, og
Jens Marni Hansen at syngja nakrar sangir úr endurútgivnu yrkingasøvnunum hjá T.N. Djurhuus: "Og dansurin gongur" og " Tættir og vísur"

Kári Árting & Kári Justinussen

:)
Rit&Rák